Tórshavn, 20. december 2023

## Vegleiðing til skúlatíð og skipan við lønarendurgjaldi fyri FHS lærugreinar

Felagskunngerðin (nr. 83 frá 2013) ásetur sambært § 6, stk. 1, pkt. 2, at skemalagda undirvísingarvirksemið í mesta lagi fevnir um 36 pulstímar um vikuna, og í stk. 2 stendur, at skúlagongdin hjá lærlingum svarar til starvstíðina hjá fulltíðarsettum á arbeiðsmarknaðinum. Ásetingar um skúlavikur sambært útbúgvingarkunngerðum eru sostatt at meta sum fulltíðarsettar arbeiðsvikur.

Fyrsta skúlaskeið/grundskeiðið í útbúgvingunum til sølufólk og skrivstovufólk er ásett at vera FHS og er ásett at vera 40 vikur. Í kunngerðini fyri FHS (nr. 110 frá 2015) er tað sambært § 15 býtt í 35 vikur til undirvísing og 5 vikur til próvtøku.

Um lærlingur hevur tikið ein fullan FHS sum part av yrkisútbúgvingini, verður lønarendurgjaldið sambært § 33, stk. 4 í yrkisútbúgvingarlógini (nr. 94 frá 1998) roknað av 40 arbeiðsvikum (200 dagar) til viðkomandi sáttmálaløn og lønarstig.

Um lærlingur hevur tikið ein part av FHS sum lið í yrkisútbúgvingini verður lønarendurgjaldið roknað fyri tiknu FHS lærugreinirnar, við støði í klokkutímatali og næmingatíð sambært talvu 1.

Klokkutímatalið fyri ein fullan FHS liggur um 900 klokkutímar sambært kunngerð nr. 110 frá 2015 fyri FHS og er sambært upplýsingum frá skúlunum 946 í praksis, tá er næmingatíð íroknað.

Skúlin sendir váttan um lærlingur hevur tikið fullan FHS ella um lærlingur hevur tikið ávísar FHS lærugreinar sum part av yrkisútbúgvingini til Yrkisdepilin. Um lærlingur hevur tikið ein part av FHS lærugreinunum sum part av yrkisútbúgvingini vátta skúlarnir, hvørjar lærugreinar lærlingurin hevur tikið.



Hoydalsvegur 1
FO-100 Tórshavn
+298 30 65 60
yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo
**yrkisdepilin.fo**

Talva 1. Lærugreinir í einum fullum FHS

| Lærugrein | Klokkutímar | Næmingatíð | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Føroyskt C | 105 | 30 | **135** |
| Enskt C | 100 | 15 | **115** |
| Kunningartøkni C | 75 | 0 | **75** |
| Lestrarmenning | 25 | 0 | **25** |
| Samfelagsfrøði C | 75 | 0 | **75** |
| Sølubúskapur C | 100 | 15 | **115** |
| Virkisbúskapur C | 125 | 15 | **140** |
| Støddfrøði C (Val) | 125 | 40 | **165** |
| Val C | 75 | 0 | **75** |
| Verkætlan | 26 | 0 | **26** |
| **Klokkutímar tilsamans** | **831** | **115** | **946** |

Yrkisdepilin umroknar frá klokkutímum til arbeiðsdagar og rindar lønarendurgjald sambært hesi útrokning.

## Leistur fyri útrokning

Ein fullur FHS er 40 arbeiðsvikur, tvs. 200 arbeiðsdagar. Ein fullur FHS er 946 klokkutímar sambært talvu 1. Talið av klokkutímum fyri ein arbeiðsdag verður funnið soleiðis:

946 klokkutímar/200 arbeiðsdagar = 4,7 klokkutímar/arbeiðsdag

Tvs. at roknast skal 1 arbeiðsdag fyri hvørjar 4,7 klokkutímar sambært váttan frá skúlunum um tikin fak og klokkutímatal sambært talvu 1. Talið av arbeiðsdøgum verður funnið við at býta klokkutímatalið við 4,7. Roknaða dagatalið sambært hesum leisti er íroknað próvtøkutíðarskeið.

Útroknaða daga-/vikutalið fyri skúlaskeiðið sambært hesi vegleiðing er samstundis dagatalið sum lærlingur hevur rætt til at brúka til skúlaskeiðið og hervið talið fyri arbeiðsdagar, sum lærlingur samanlagt skal hava frí frá arbeiði til at røkja skúlagongdina.

Hoydalsvegur 1 · FO-100 Tórshavn
+298 30 65 00 · yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo · **yrkisdepilin.fo**